# Embætisverkið størri ábyrgd

**– Eg taki undir við, at uttanríkismál verða savnað undir eina fyrisiting, og hetta er ein ætlan, vit í undanfarnu samgongu eisini arbeiddu við, men avleiðingarnar av broytingunum í fyrisitingini kunnu vera, at størri ábyrgd verður løgd á embætisverkið og minni á politisku stýringina, sigur fyrrverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg**

FYRISITINGIN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



Eftir at nýggja samgongan tók við, eru ráðini skerd frá níggju niður í sjey, og hetta hevur kravt stórar broytingar í fyrisitingini. Fyrrverandi løgmaður Anfinn Kallsberg sigur seg ikki hava nóg mikið innlit í broytingarnar at meta um ítøkiligu avleiðingarnar, men vísir hann tó á nakrar broytingar, sum helst vera at síggja.

**Politiska stýringin minkar**
Hóast talan er um tvey ráð færri samanborið við undanfarnu stjórn, eru eingi arbeiðsfólk í umsitingini søgd úr starvi, og ein kann so spyrja, hvar sparingarnar eru í ætlanunum. Anfinn Kallsberg sær fyrst og fremst eina sjálvsagda fylgju av hesum.

*– Við broytingunum í fyrisitingini verður nakað av vektini flutt frá politisku og yvir í embætisligu stýringina, sigur fyrrverandi løgmaður Anfinn Kallsberg, sum tekur undir við, at uttanríkismálini nú eru savnað*

– Sparingarnar liggja í, at færri politikar skulu hava løn, meðan útreiðslurnar ikki lækka í embætisverkinum, og spurningurin eru so, hvussu stórt embætismannaveldi ein vil hava samanborið við politisku stýringina, sigur Anfinn Kallsberg.

– At ráðini eru farin frá níggju niður í sjey, uttan at nakar er uppsagdur, hevur sjálvsagt við sær, at politiska stýringin er minkað, meðan embætisliga fyrisitingin fær størri uppgávur og ábyrgd, og tað er so ein politiskur spurningur, hvat man vil við fyrisitingini, sigur Anfinn Kallsberg. Fyrrverandi løgmaður metir ein vanda vera, at fleiri embætisstýrið vera enn politisk stýri.

– Sambært stýrisskipinarlógini kunnu í prinsippinum tríggir landsstýrismenn umsita øll málsøki, men tá missir ein jú politisku stýringina, og hetta er tískil ein problematikkur, samgongan má taka støðu til, vísir Anfinn Kallsberg á.

**Løgmaður fær nógv at gera**
Fyrrverandi løgmaður tekur undir við, at uttanríkismálini nú eru savnað undir Uttanlandsdeildina hjá løgmanni, og talan er um eina ætlan, Anfinn og hansara stjórn arbeiddi nógv við í farna valskeiði. Fyrr vóru uttanríkismálini spjadd í Fiskimálaráðnum, Vinnumálaráðnum og Uttanlandsdeildini, og tað var sambært Anfinni Kallsberg als ikki nøkur nøktandi støða.

– Tað var ein støðugur politiskur vilji at savna hetta stóra økið, og kjakið tá snúði seg um, hvørt tað skuldi hoyra undir løgmann, ella um ein uttanríkismálaráðharri heldur enn ein innanríkismálaráðharri skuldi setast, sigur Anfinn Kallsberg, sum avgjørt metir tað vera skilagott at fáa samskipað og sett fokus á stóra og týdningarmikla málsøkið, sum uttanríkismál eru.

– Tað veldst um, hvussu tað verður samskipað, men tað kann koma at krevja nógv av løgmanni, tí skal hann luttaka í samráðingum, verður hann helst lítið í Føroyum, heldur Anfinn Kallsberg, sum tó undirstrikar, at hann ikki hevur innlit í innihaldið í sjálvum broytingunum.

# Fótbóltur á stórskíggja

TÍÐINDASKRIV

Á Vertshúsinum í Havn vísa tey nú sjónvarp á stórskíggja í kjallaranum.

Har fara reglulga at hava sýningar við altjóða fótbólti. Tey halda tað vera so hugnaligt umhvørvi at sita saman við øðrum og leska sær við onkrum góðum afturvið fótbólti.

# Arnold Vegghamar í Galerie Focus

**Fríggjadagin, 27. februar kl. 16 til 18, letur Arnold Vegghamar upp málningaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn**

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*



Arnold Vegghamar er føddur í 1937, útbúgvin silvursmiður og býr á Viðareiði. Í Føroyum hevur hann m.a. havt stakframsýningar við í Listaskálanum og verið við á Várframsýningum. Í Danmark hevur hann m.a. sýnt fram í Sønderborg, Hirtshals og í Galleri Sct. Gertrud í Keypmannahavn.

Vincent van Gogh (1853-1890) spyr bróður sín, Theo, soleiðis: »Kundi tað ikki verið møguligt, at man sær eitt ting betur og rættari, tá man elskar tað, enn tá man ikki ger tað?«. Arnold Vegghamar málar náttúruna - tað eru ikki vanligar náttúrulýsingar, men heldur persónligar surrealistiskar tulkingar av landslagnum. Tað handlar ikki um, um tað líkist náttúruni, tað handlar um tann innara ósjónliga sannleikan - upplivingar, kenslur, sinnisrørslur og ímynd. Tað vil siga, at mála sinnisstøðuna, tí hetta er ein veruleiki, sum júst er avgerandi fyri tann ovurhugaða og sinnisrørda listamannin. Hansara týðuligu penslastrok og sterku litir ímynda tann innara ófriðin og fær alla náttúruna at liva og røra seg. Heimsmyndin sær annaðleiðis út enn vit sansa - listamaðurin letur seg ikki leiða av passivt registrerandi virksemi, tá hann skoðar veruleikan, hann skapar sína egnu heimsmynd bygda á vilja og skapanarmegi.

Munurin á góðari og vánaligari list er millum annað, at góð list krevur nakað av sínum áhoyrara og áskoðara, meðan vánalig list ikki ger tað. Málningarnir hjá Arnold Vegghamar krevja nakað av áskoðaranum.

Á framsýningini eru 21 oljumálningar, har motivið er náttúran har norðuri á Viðoynni, lendingin, bygdin, hamrar og urðar. Framsýningin verður frá 27. februar kl. 16 og fram til 12. mars, týsdag - fríggjadag kl. 14 - 18, leygardag kl. 16 - 18.





# Nú eru sjey aðalráð

**Løgmaður vil ikki siga, hvat rætta talið av aðalráðum er. Hann heldur spurningin vera verdan at taka upp í grundlógarnevndini. Fleir broytingar í aðalráðum verða ikki gjørdar hetta valskeiðið**

SKERJINGAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Ilt er at siga, hvat er rætta talið av aðalráðum. – Hetta er helst ein spurningur til grundlógarnevndina at viðgera, heldur løgmaður, sum tó heldur, at tað meira ella minni átti at ligið fast*

Týsdagin kunngjørdi løgmaður broytingarnar í miðfyrisitingini. Aðalráðini, sum vóru níggju, blivu til sjey, tá hendan samgngan tók við, og nú eru endaligu broytingarnar gjørdar, soleiðis at vit nú eisini hava sjey aðalstjórar, tá løgmansstjórin er taldur við.

– Okkara mál var at minka ráðini úr níggju niður í seks, men hetta varð so telvingin, sigur Jóannes Eidesgaard, tá vit spyrja hann, um hann er nøgdur. Í valstríðnum legði Javnaðarflokkurin dent á, at aðalráðini einans skuldu vera seks í tali.

– Vit hava tosað nógv um hetta undir samráðingunum, men semja bleiv so um hesa skipanina, sigur løgmaður.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at hann hevði hugsað sær eitt vinuumálaráð, sum einans skuldi fáast við vinnu. Men hann viðgongur, at fiskivinnuøkið er so stórt og so týðandi, at tað óivað er rætt at varðveita Fiskimálaráðið sum eitt serstakt ráð.

Spurdur um ráðini skulu minka enn meira, sigur løgmaður, at tað verður so ikki í hesum valskeiðinum.

– Men tað er so ein prinsippiellur spurnngur, sum vit mugu taka upp, hvussu vit skipa ráðini, sigur løgmaður, sum stamstundis spyr, um tað er rætt, at tað er tann politiska kabalin, sum skal gera av talið á ráðum.

Tað sum løgmaður uttan iva sipar til, er gongdin síðani nýggju stýrisskipanarlógina.

Tá Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin skipaðu landsstýri í 1998, vaks talið av landsstýrisfólkum upp í átta. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fingu hvør sínar tríggjar, meðan Sjálvstýrisflokkurin fekk tveir. Í 2002 misti hendan samgonga meirilutan. Miðflokkurin kom afturat, og fyri at kabalin skuldi ganga upp, vaks talið av landsstýrisfólkum upp í níggju, soleiðis at Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin fingu hvør sín landsstýrismann, meðan Tjóðveldisflokkurin fekk ein afturat.

Men løgmaður er tó ikki sannførdur um, at tað er rætt at læsa seg fastan við eitt ávíst tal av aðalráðum.

– Grannalond okkara brúka somu skipan sum vit, og har síggjast eisini broytingar í talum av aðalráðum, tá stjórnarskifti eru. Eitt nú minakaði Andres Fogh Rasmussen talið av aðalráðum í Danmark úr 21 niður á 18, tá hann tók við í 2001. Tá vóru nøkur ráð løgd saman.

– Hetta er helst ein spurningur til grundlógarnevndina at viðgera, heldur løgmaður, sum tó heldur, at tað meira ella minni átti at ligið fast.

Hóast talan ikki er um sparingar í fyrstu syftu, so sigur Jóannes Eidesgaard, at talan upp á longri sikt verður um sparingar.

– Vit hava so spart tveir landsstýrismenn burtur. Fremsta uppgávan hjá landsstýrismonnum nú verður at spara, tí vit skulu gera eina fíggjarlóg, sum nú stendur til at fáa eitt hall upp á góðar 400 milliónir krónur, sigur løgmaður

Jóannes Eidesgaard harmast um, at starvsfólk í aðalráðunum skulu hava livað í hesi óvissuni, sum hevur valdað, og tí var hetta eitt mál, sum landsstýrið vildi fáa upp á pláss beinanvegin, men sum hann skilir tað, so er alt farið fram í besta forstáilsi.

# Alt undir løgmann

**Tað er fyri at fáa betri yvirlit, at allar uttanríkissamráðingar verða savnaðar á uttanlandsdeildini hjá løgmanni**

SKERJINGAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Allar uttanlandssamráðingar verða nú savnaðar undir løgmann. Hetta er eisini ein av broytingunum, sum løgmaður boðaði frá týsdagin.

*Men hví verður hetta gjørt, er tað tí, at løgmaður vil stýra øllum sjálvur?*

– Nei, tað er tað als ikki. Hetta er einans gjørt fyri at hava betri yvirlit. Uttanríkisdeildin er á Løgmansskrivstovuni, og tað er so nátúrligt, hon hevur við allar uttanríkissamráðingar at gera, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann vísir eisini á, at tað sum er hent seinnu árini er, at løgmaður hevur útdelegerað fleiri og fleiri mál til landsstýrismenninar at standa fyri sjálvir, eisini uttanríkissamráðingar. Hetta hevur kortini ført til, at hvør hevur arbeitt í sínum lag.

– Tað er hetta, sum vit vilja broyta. Hetta er ikki bara nakað, sum løgmaður sjálvur hevur funnið uppá, hetta er gjørt í semju – eisini hevur hetta verið eitt ynski frá Fólkaflokkinum, sum serliga vísti vilja til at styrkja Uttanríkisdeildina, sigur løgmaður, sum greitt vísir aftur, at hetta er ein kritikkur av leiðsluháttinum hjá Anfinni Kallsberg, fyrrverandi løgmanni.

Men tað verður kortini ikki løgmaður, sum fer at leiða allar samráðingar.

– Aðalráðini hava hvør í sínum lag servitan, og tí fer løgmaður t. d. ikki uttanlands at samráðast um fisk.

Jóannes Eidesgaard vísir eisini á, at uttanlandssamráðingarnar hjá t. d. Fiskimálaráðnum fylla so nógv og taka so nógva orku. Hann sigur, at tað er alt ov nógv at krevja av aðalstjóranum í Fiskimálaráðnum, at hann eisini skal taka sær av samráðingum uttanlands.

– Tí hava vit flutt Kaj P. Mortensen, sum er tann størsti kapasiteturin á økinum, út á uttanlandsdeildina, har hann skal virka sum serkønur innan fiskivinnusamráðingar, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Herálvur úr olju í fisk



*Herálvur Joensen fer úr Oljumálaráðnum at stjórna Fiskimálaráðnum. Sólja í Ólavstovu fer úr Almannaráðnum at standa fyri tí løgfrøðisliga í Fiskimálaráðnum og Kaj P. Mortensen skal standa fyri fiskivinnusamráðingum á Uttanríkisdeildini*

**Herálvur Joensen verður nýggjur aðalstjóri í Fiskimálaráðnum. Aðalstjórarnir, Kaj P. Mortensen og Sólja í Ólavstovu, verða ávikavist flutt á Løgmansskrivstovuna og í Fiskimálaráðið**

SKERJINGAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nú eru aðalráðini minkað úr níggju niður í seks. Hetta gjørdi løgmaður kunnugt týsdagin.

Broytingarnar vóru, at:

- Almannaráðið og Familju- og heilsumálaráðið eru løgd saman í eitt ráð, ið nevnist Almanna- og heilsumálaráðið
- Oljumálaráðið og Løgmálaráðið eru niðurløgd og Innlendismálaráðið sett á stovn

Aðalstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum verður Aibritt á Plógv, ið higartil hevur verið aðalstjóri í Familju- og heilsumálaráðnum.

Aðalstjórin í Almannamálaráðnum, Sólja í Ólavsstovu, verður flutt í starv sum deildarstjóri við ábyrgd fyri lógarmálum í Fiskimálaráðnum.

Aðalstjórin í Oljumálaráðnum, Herálvur Joensen, verður fluttur í starv sum aðalstjóri í Fiskimálaráðnum. Starvsfólkið í Oljumálaráðnum verða flutt til ávikavist Innlendismálaráðið og Vinnumálaráðið.

Verandi aðalstjóri í Fiskimálaráðnum, Kaj P. Mortensen, verður fluttur í starv í Løgmansskrivstovuni, har hann skal virka sum serfrøðingur innan fiskivinnusamráðingar við onnur lond. Samstundis veður fyrisitingin av millumtjóða fiskirættindamálum flutt til Løgmansskrivstovuna.

## Fakta

Aðalstjórar eru settir sum aðalstjórar í miðfyrisitingini. Teir eru ikki settir í ávísum aðalráð, og skulu tí tola at verða fluttir. Teir eru settir sum tænastumenn.

Teir báðir aðalstjórarnir, Kaj P. Mortensen og Sólja í Ólavstovu, sum eru flutt í onnur størv, varðveita síni setanarligu og lønarligu rættindi sum tey hava aðalstjórar í nýggju størvunum.

Lønin hjá aðalstjórum er 46.193 kr og 72 oyru um mánaðin.